út at koyra

Ljó›leysar stoyt-royndir

Volvo sparir stórar upphæddir vi› at ein supertelda fastleggur allar trygdareginleikar í bilinum, me›an hann er á teknibor›inum, har stoytroyndir ver›a gjørdar ljó›leysar á telduni, og uttan at bilar ver›a vrak .

Kelda: Bilen Motor & Sport

Fiat kappast

Bilurin er kamuflera›ur

Eins og Ford fer Fiat nú eisini at kappast vi› Citroën Berlingo og Peugeot Partner. Bilurin ver›ur væntandi á Paris Motorshow nú í heyst.

Kelda: FDM / Motor

Avensis facelift

Toyota Avensis ver›ur nú broyttur naka›, bæ›i uttan og innan, eins og f‡ra n‡ggir motorar ver›a á skránni.

Kelda: Motor Magasinet

VW bil til 50 ára fø›ingardagin

MAGNUS GUNNARSSON

Mánadagin fylti Klaksvíkar Sløkkili› 50 ár. Sama morgun kom ein n‡ggjur VW bilur til landi›, sum sløkkili›i› skuldi hava. Hetta er ein f‡rahjólstrektur VW Transporter vi› 5 syl. 2,5 litur bensinmotori og 116 hk.

Rúmligur innan

Bilurin skal brúkast til at hava hjálparútger› í, so sum froskmannaútger›, saks at klippa fólk leys úr bilum, plátur at negla fyri vindeygu og tílikt. Hann hevur høgt tak og er rúmligur innan vi› sitiplássum til 6 fólk vi› føraranum. Á takinum er umframt ávaringarljósini, ein ljóskastari, sum ver›ur st‡rdur elektroniskt frá instrumentbor›inum.

Hátí›arhald leygardagin

Seinasta leygardagin var hátí›arhald á sløkkili›stø›ini, har t.d. børn sluppu túr vi› brandbilunum og fingu eitt skreytbla› vi› heim til minnis. Sum vit sóu ta› seinasta mánadag, hevur Klaksvíkar Sløkkili› avgjørt brúk fyri bilum vi› gó›ari hjálparútger›.

Øssur Johennesen handar Kára Kjelnæs brandmeistara lyklarnar til bilin

N‡ggjur Ford Mondeo á veg

MAGNUS GUNNARSSON

Ford Mondeo kom á markna›in í 1993 sum avloysari fyri Sierra. Bilurin hevur veri› ein »succes«, og nú ver›ur ein n‡ggjur Mondeo s‡ndur fram á Paris Motorshow, sum ver›ur frá 3. september til 15. oktober.

Framskunda›ur

Ætlanin var at hann skuldi koma í 2001, men av tí at fleiri kappingarneytar eru á veg vi› n‡ggjum modellum, ver›ur hann s‡ndur fram nú í heyst. Mondeo fær bensinmotorar vi› beinlei›is innspræning, og væntandi kemur ein dieselmotorur seinni, i› er gjørdur í samstarvi vi› PSA (Peugeot/Citroën).

F‡ra bilar sama plattform

Mondeo er fyrsti bilur sum er bygdur yvir ein n‡ggjan plattform sum eisini skal brúkast til ein komandi Jaguar X400, og tann næsta Mazda 626, eins og ein n‡ggjan Lincoln LS4.

Kelda: FDM / Motor

N‡ggi Mondeo er ein stórur og elegantur bilur, sum væntandi ver›ur eins væl móttikin og hin fyrri. Linjurnar eru ikki so rundar sum á forgangaranum.

út at koyra

Audi A2

– fyrsti aluminiumsbilurin komin

MAGNUS GUNNARSSON

Hóast aluminium er lætt, vigar ta› tungt tá ræ›ur um at finna tilfar til ein lættan og orkusparandi bil. Vi› n‡ggja Audi A2 hevur VW konsernin brúkt aluminiumstøknina frá luksusbilinum Audi A8.

Lága luftmótstø›u

Audi A2 er heimsins fyrsti hópframleiddi bilur úr aluminium. Eisini hevur ta› eydnast at fáa luftmótstø›una ni›ur á cW 0,25, i› er heimsins lægsta fyri hópframleiddar bilar. Meginparturin av stálinum er skift út vi› aluminium, og t.d. fja›raskipanin er 80 kg léttari enn vanligt.

Lætt at endurvinna

Bilurin er bygdur yvir eina aluminiumsrammu, eins og uttaru panelini eru úr aluminium. Audi vil vera vi›, at bilurin er 15% lættari, enn um hann var gjørdur úr stáli. Aluminium rustar ikki og er lætt at endurvinna, men er d‡rari enn stál.
Innan er bilurin í vanligum Audi stíli, har alt er vælvirkandi og lætt at handfara. Bilurin er gó›ur at koyra, og kennist ikki sum ein lítil bilur. St‡ringin er føst og beinlei›is, og er bilurin sportligur at koyra. Ta› merkist, at Audi hevur drúgvar royndir vi› forhjólstrekki.

Áfyllingin til olju og sprinklaravesku er frammanfyri, har kølaragittari ver›ur lati› upp so sleppast kann til

Bensin og turbodiesel

Í fyrsta umfari ver›a tveir motorar at velja ímillum, ein 4 syl. 1,4 litur bensinmotorur vi› 75 hk. og ein 1,4 litur 75 hk. turbodiesel vi› trimum sylindarum. Motorhjálmurin er ikki til at lata upp. Áfyllingin til olju og sprinklaravesku er frammanfyri, har kølaragittari ver›ur lati› upp so sleppast kann til. Bert Audi verksta›urin hevur atgongd til motorrúmi›. Til forrútin er ein stórur viskari, i› klárar sína uppgávu væl, og heldur allan rútin reinan. Av útger› kunnu vit nevna t.d. automatiskt klimaanlegg, el rútar framman, radio vi› fløguspalara og tokuljós framman.
Audi setur eisini n‡ggjan standard vi›víkjandi vi›líkahaldinum, har bensinútgávan hevur 30.000 km millum eftirs‡nini og dieselútgávan 50.000 km. Oljuskiftini eru tó sum vanligt.

Innan er bilurin í vanligum Audi stíli, har alt er vælvirkandi og lætt at handfara

Audi A2 1.4

Motorurin	1,4 litur 4 syl. 16V 75 hk.
0-100 km/t	12 sek.
Bensinn‡tsla	21,3 km/l
Dekkstødd	185/50-16
Longd	383,0 cm
Breidd	167,0 cm
Hædd	155,0 cm
Eginvekt	895 kg.
Prísur	kr. 209.000,-
Søluumbo›	P/F Bilasølan v.Øssur Johannesen Vegurin Langi FO- 188 Hoyvík Tlf. 315354